## Partaeigarametan á skránni

**– Hvussu stimbra vit um partaeigaramentanina í Føroyum? Hetta spyr Fólkaflokkurin í Suðurstreymoy, sum mikudagin 22. februar kl. 19.30 skipar fyri almennum kjakfundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni um evnið**

KJAKFUNDUR

Í Føroyum er ikki vanligt, at Palleba keypir og selir partabrøv, men tað er vanligari í teimum londum, vit plaga at samanbera okkum við. Uppskot var frammi herfyri, um at skattafrádráttur skuldi latast teimum, sum keyptu partabrøv í teimum almennu partabrøvum. Hetta er so ein máti at stimbra um partaeigaramentanina. Men er hetta rætti mátin at gera tað uppá, spyr Fólkaflokkurin, sum hevur sett hetta evnið á skránna á almennum fundi í Havn mikukvøldið.

Fyrireikararnir spyrja eisini, um tað gagnar samfelagnum, at Palleba keypir og selir partabrøv? Verða tað ikki bara tey ríku sum verða ríkari?

Í pallborðum verða umboð fyri bankaheimin, vinnuna og fólkaflokkin.

# Kári spyr um lønhæddaravgjald

**– Hvat er orsøkin til, at vit fyri ávíst virksemi hava eitt lønhæddaravgjald? Hendan spurning fer Kári P. Højgaard, løgtingsmaður at seta Bárði Nielsen, fíggjarmálaráðharra**

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Kári P. Højgaard vil samstundis hava at vita, um ein einmansfyritøka innan heilsutænastu, har eigarin við virksemi sínum t. d. fær 250.000 kr í ársinntøku umframt vanligan lands- og kommunuskatt, fær ein 2,5% eykaskatt í mun til aðrar skattaborgarar.

Kári P. Højgaard spyr landsstýrismannin, um svarið er játtandi, um so ikki talan er um ójavna.

– Hevur landsstýrismaðurin nakrar ætlanir um at fáa lógina endurskoðaða, spyr Kári P. Højgaard.

Í viðmerkingum til fyrispurningin vísir Kári P. Højgaard á løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 við seinni broytingum, sum áleggur ávísum virksemi eitt lønhæddaravgjald.

Læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt.

Tryggingarvirksemi.

Banka-, og sparikassa- og fíggarvirksemi.

– Eg ynski við hesum fyrispurningi er at seta ljóskastaran á, um allir privatpersónar eru líka fyri lógini. Tí fevnir fyrispurningurin ikki um partafeløg, aðrar juridiskar persónar, tryggingarfeløg, sparikassar ella bankar, sigur Kári P. Højgaard.

Hann vísir kortini á, at hann væntar sjálvsagt, at svarið til spurning 2 er nei.

– Er svarið harafturímóti ja, so sigur landstýrismaðurin í veruleikanum, at tað er í lagi, at fólk verða skattað ymiskt av somu inntøku hóast búsett ir í somu kommunu við somu skattskyldigu inntøku, tað verði seg A ella B-inntøku ella partvís bæði, sigur Kári P. Højgaard.

Spurningurin er, um lønhæddaravgjaldið í verki ger, at grannum verður álagt ymiska tvungna avgjaldsbyrðu t. v. s. eru ymiskt skattaðir av somu inntøkum. Skatta/lønar-avgjaldsbyrðan er alt at rokna sum skattur, líka mikið uppfinnsemið at smíðja nýggj nøvn á eykaskattir til fólk, ið hava valt sær arbeiði innan áðurnevndu arbeiðsøki, sigur Kári. P. Højgaard.

## Stórt tiltak í Skálanum í Klaksvík

**Føstulávintsleygarkvøldið 25. februar kl. 19 skipar Stuðulsfelagið »Dragin« fyri stórum borðhaldi við sangi og frá kl. 23 verður dansur**

FØSTULÁVINT

Í Klaksvík er tað er ofta langt ímillum tiltøkini av hesum slag fyri vaksin og eldri. Tí skipar Stuðulsfelagið Dragin aftur í vetur fyri einum hugnakvøldi í Skálanum føstulávintleygarkvøld kl. 19. Vanliga hevur verið borðreitt við breyði og góðum føroyskum viðskera, men í ár verður tað heitur matur. Undir borðhaldinum verður felagssangur saman við harmonikutónleiki eins og hini árini.

Frá kl 23 verður dansur, har bólkurin »Flemming og vinmenn« (úr Norrøna band) spæla.

Stuðulsfelagið vónar, at nógv fólk fara at tekna seg til hugnakvøldið, tí allur peningurin fer óskerdur til Skúlaskipið.

# Leirvíkar kommuna nýggja heimasíðu

**Leirvíkar kommuna hevur fingið nýggja heimasíðu, ið skal nýtast til at kunna borgarar í kommununi og onnur um viðurskiftini í kommununi, og um hvørji tilboð eru til borgarar bæði innan tænastur, trivnað, mentan og hentleikar í bygdini**




KUNNING

– Leirvík hevur eitt virkið mentunar- og felagslív, og tí hevur heimasíðan ein kalendara, so borgarar og onnur kunnu fáa upplýsingar um tiltøk í bygdini. Sum ein liður í at fáa meiri opinleika í bygdarráðsarbeiðnum liggja fundarskráir og gerðabøkur alment úti, so fólk til eina og hvørja tíð kunnu fylgja við í hvørji mál eru fyri í bygdarráðnum, sigur byrgdarráðið í tíðindaskrivi.

Leirvíkar kommuna hevur verið ógvuliga sjónlig í fjølmiðlum seinastu tíðina, og kjakið um vegaføringina í samband við Norðoyatunnilin er ikki hasað av enn.

– Í hesum sambandi er tað sera týdningarmikið, at eisini bygdarráðið hevur ein miðil at bera fram sína áskoðan viðvíkjandi hesum og øðrum málum. Á henda hátt hava borgarar í kommununi og onnur eitt stað, har tey kunnu fáa meiri at vita um støðuna hjá bygdarráðnum, so tey ikki bert hoyra og síggja tað í miðlunum. Í løtuni er nógv at lesa um málið viðvíkjandi vegaføringini á heimasíðuni, sigur bygdarráðið.

Adressan hjá heimasíðuni er www.leirvik.fo

Heimasíðuloysnin hjá Leirvíkar kommunu er gjørd við heimasíðuskipanini hjá Sansum.

## Mikudagin er hugsanardagur skótanna

**Hugsanardagurin, sum er 22. februar, halda skótar um allan heim**

SKÓTAR

Hugsskotið til hugsanardagin kom í 1926 á fjórðu heimsráðstevnuni hjá WAGGGS, (World Association of Girl Guides and Girl Scouts), sum varð hildin í USA. Ráðstevnan avgjørdi, at hetta skuldi vera ein serligur dagur, har gentuskótar um allan heimin hugsa um hvørja aðra. Ráðstevnan avgjørdi eisini, at dagurin skuldi vera 22. februar, tí hetta var føðingardagurin hjá Lord Baden-Powell, stovnaranum av skótarørsluni og konu hansara Olave, sum tá var leiðari fyri Heimsskótafelagsskapin.

Síðan hevur dagurin verið hildin um allan heimin sum ein altjóða skótadagur. Á enskum verður dagurin nevndur World Thinking Day ella World Friendship day, tí á hesum degi hugsa vit um skótavinir okkara kring allan heimin.

Tveir heimsfelagsskapir eru: WAGGGS, sum er ein gentufelagsskapur og WOSM (World Organization of the Scout Movement), sum er ein blandaður felagsskapur. Knappliga 40 milliónir skótar eru um allan heimin.

Í Føroyum verður hugsanardagurin hildin við skótaguðstænastum og skótasamkomun kring landið. Talvan gongur í øllum kirkjunum fyri Skótahjálpina.

Guðstænastur vera á hesum støðum mikukvøldið 22. febr.
kl. 19.00: í Havnar kirkju, í Dals kirkju, í Fuglafjarðar kirkju og í Cristianskirkjuni.
kl. 19.30: í Húsa kirkju og
kl. 18.30: í Kvívíkar kirkju
Øll eru hjartaliga vælkomin til guðstænastuna, sigur Føroya Skótaráð.

# Grýludansurin 15 ár

**Fyri 15. ferð skipar dansifelagið Kom og Dansa fyri grýludansi føstulávintsleygarkvøld 25 februar**

GRÝLUDANSUR

*Tíðindskriv*

Í ár verður tiltakið í Mentanarhúsinun í Fuglafirði, og til dansin í ár fara teir vælumtóktu Showmenn at spæla.

Fyrireikarnir siga, at teir hava hesi árini roynt at gera tiltakið meir fjølbroyt enn vanlig dansitiltøk flest, og hevur nógv forvitnisligt verið á skránni hesi árini.

Eisini hevur verið pyntað við ljósperum og ballónum hvørt ár.

Sigast kann, at hetta er vorðin ein verulig tradition, og hava nógv fólk verið til dansin hvørt ár. Mest úr Eysturoynni , men nógv eru eisini komin aðrastaðni frá.

Nú er eisini góður møguleiki hjá vágafólki at koma til tiltakið.

Og mong av teimun sum koma hava nýtt møguleikan at lata seg í grýluklæðir. Ein hevur týðuliga sæð, at nógv av teimun hava brúkt nógva tíð at seyma og annars gera sær eina drakt.

Fyriat gera tað meira áhugavert og spennandi at gera góð og orginal grýluklæði, hevur tað á hvørjun ári verið latnir góðir vinningar til bestu grýlurnar, og í ár verða eisini góðir vinningar latnir til nr 1-2-3.

Nevnast kann, at grýluklæðini skulu vera heimagjørd fyri at koma upp í part tá dømast skal.

Ikki tí, keypt grýluklæðir eru eisini meir enn vælkomin, men tað verður ikki hildið at verið rætt, at ein sum fer inn í ein handil og keypir sær ein drakt, skal vinna yvir einum, sum hevur sitið og nýtt hendur og hugflog og nógva tíð til arbeiðið.

Bussar koyra úr Vágum og Vestmanna og Tórshavn og Sundalagnum eins og bussar koyra av Strondum og Toftum – á vegnum verður koyrt gjørnum Gøtu og Leirvík.

Allir bussarnir koyra heim aftur eftir dansin

Tiltakið verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið 25. februar.

## P-dagur hjá Restorffs

Páskabryggið 2006 frá Restorffs Bryggjarí verður at fáa frá fríggjadegi komandi. Í hesum sambandi verður P dagur friggjadaginmillumklokkan 17-18.00 ymsastaðni kring landið.

Av Restorffs Bryggjarii siga tey, at páskabryggið er bryggjað av munchener og lagurmalti. Tað er skúmandi við døkkum liti, runt og vælsmakkandi. Tað verða bert tappaðir 30.000 fløskur av hesum bryggi.